# KONGSHAVN 7.000 TONS MINNI Í ÁR

**FISKIVINNA** Fram til endan av juli mánaða í ár hevur landingarmiðstøðin Kongshavn í Saltangará landað heili 7.000 tons minni enn somu tíð í fjør

Vilmund Jacobsen

Fyrstu sjey mánaðirnar í ár landaði landingarmiðstøðin Kongshavn í Saltangará tilsamans 19.600 tons av fiski. Av hesum vóru 14.400 tons upsi og 5.100 tons gulllaksur.

Hyggja vit eftir, hvussu undanfarin ár hava hildnast, síggja vit, at tað serliga er árið 2009, sum skarar fram úr í nøgd.

Fyrstu sjey mánaðirnar í 2009 landaði Kongshavn 26.600 tons, sum eru heili 7.000 tons fleiri enn um somu tíð í ár.

Í 2008 og 2007 vóru samlaðu nøgdirnar ávikavist 21.900 og 16.500 tons.

Seinastu mánaðirnar hevur upsaveiðan roynst vánalig, og hetta er høvuðsorsøkin til minkandi landingarnøgdirnar, umframt tað, at minni av gulllaksi er komin upp á land í ár.

**»» seinastu mánaðirnar hevur upsaveiðan roynst vánalig**

### Líkist 2008

Landingarmiðstøðin Kongshavn hevur fram til endan av juli mánaða í ár landað tilsamans 5.100 tons av gulllaksi, men somu tíð í fjør var nøgdin 7.900 tons – og somu tíð í 2008 og 2007 vóru nøgdirnar av gulllaksi ávikavist 6.000 og 4.700 tons.

Gulllaksaveiðan hevur sum heild verið rímiliga góð í vertíðini í ár.

Ein orsøkin til, at landingarnøgdirnar við endan av juli mánaða í ár vóru væl minni enn í fjør, er, at Eysturbúgvin, sum hevur partrolað saman við Vesturbúgvanum og plagar at landa gulllaksin í Saltangará, breyt motorin tíðliga í vertíðini í ár.

Í hansara stað saman við Vesturbúgvanum hevur verið djúpvatnstrolarin Steintór, sum er heimahoyrandi í Hvalba, og hann hevur lagt veiðina upp á Toftum – og ikki í Saltangará.

Á landingarmiðstøðini Kongshavn siga tey, at sjálvandi høvdu nøgdirnar av gulllaksi í ár ikki verið so stórar sum í 2009, hóast Eysturbúgvin hevði verið í vinnu alla vertíðina, men hesar høvdu í øllum førum líkst teimum í 2008.



*Landingarmiðstøðin Kongshavn í Saltangará landar ein munandi part av ísfiskaveiðini undan Føroyum*

Mynd: Vilmund Jacobsen

### Triði túrur

Tá motorurin á Eysturbúgvanum brotnaði í mai mánaða í ár, væntaði skiparin, Jóan Petur í Soylu, at øll gulllaksavertíðin, sum tá júst var byrjað, fór at rúka.

Men tað gjørdi hon ikki kortini.

Eysturbúgvin og Vesturbúgvin eru nú á triðja túri, síðan skipið fekk nýggjan motor, og um middagsleitið í morgin landar Eysturbúgvin aftur í Saltangará, samstundis sum Vesturbúgvin helst landar til Faroe Pelagic í Kollafirði.

vilmund@sosialurin.fo

## Landa gulllaks og upsa í Saltangará

**FISKIVINNA** Í dag og í morgin landar Kongshavn trý gulllaksaskip og tveir partrolarar

Vilmund Jacobsen

Polarhav og Stjørnan landa í Saltangará í dag. Skipini eru full undir lúkurnar við gulllaksi. Veiðan liggur um sløk 500.000 pund.

Um middagsleitið í morgin kemur Eysturbúgvin inn við gulllaksi. Eysturbúgvin partrolar saman við Vesturbúgvanum, sum plagar at landa til Faroe Pelagic í Kollafirði.

Hetta er triði túrur hjá Eysturbúgvanum og Vesturbúgvanum, síðan Eysturbúgvin fór í vinnu aftur eftir at hava skift motor á skipasmiðjuni MEST í Havn.

Sum skilst, hevur veiðan hesar tríggjar túrarnar verið á góðari leið, tó at skipini ikki hava verið rokfull.

### Vánalig upsaveiða

Í morgin fer landingarmiðstøðin Kongshavn ikki bara at landa gulllaks, men eisini upsa.

Bakur og Stelkur, sum eru á upsaveiði, koma eisini inn at landa í morgin. Skipini, sum hava verið úti fullan túr, hava sløk 200.000 pund av upsa.

Á landingarmiðstøðini Kongshavn siga tey, at upsaveiðan hjá partrolarunum hevur verið meiri at kalla vánalig seinastu tveir mánaðirnar.

vilmund@sosialurin.fo



*Sløk 200.000 pund av upsa. Tað er veiðan hjá partrolarunum Baki og Stelki hendan túrin*

Mynd: Vilmund Jacobsen